

UMHEIMURIN

Í dag: Kurdar!

Hans Holm skrivar:

Nú um høgtíðina frættist, at eitt skip við umleið 1500 kurdiskum flóttafólkum var strandað uttan fyri suðurstrond Italia, og at manningin var farin av skipinum og hevði latið ferðafólkið vera eftir umborð. Bjargingarskip úr Italia sóust á myndum frakta illa á hold komin fólk – menn, kvinnur og børn – í land.

Hvørjir eru nú hesir kurdar, sum vit í heilum hoyra um í fjølmiðlum? Hvar búgva teir, og hvør er orsøkin til, at vit so ofta frætta um teir? Leita vit í einum atlassi, finna vit onki ríki við navninum Kurdaland ella Kurdia, men á kortinum yvir Miðeystur stendur tvørtur um trý-fýra landamørk navnið Kurdistand. Hetta er upprunaøkið hjá Kurdum, og vísir okkum so samstundis, at Kurdar er eitt av teimum fólkasløgunum, sum onki heimland eiga, men eru spjaddir um fleiri ríki.

Av somu grund er ringt at fáa svar upp á, hvussu nógvir kurdar eru til í verðini, tí fleiri ríkisstýri, t.d. tað turkiska, nokta fyri, at teir finnast. Menn rokna við, at samlaða talið av kurdum er á leið 30 milliónir, og at teir fordeila seg soleiðis:

Í Turkalandi:	uml. 15 mill
Í Iran:	uml. 6 mill
Í Iraq:	uml. 4 mill
Í Sýria:	uml. 1½–2 mill
Í Armenia og Adzerbadjan	uml. 100.000

Afturat hesum kemur so hópin av innflytarum og flóttafólkum serliga í Europa (stórur partur – summastaðni størsti parturin – av teimum, sum sigast at vera turkiskir innflytarar ella turkisk flóttafólk, eru í veruleikanum kurdar).

Í Týsklandi: uml. 700.000 (av 2 mill. upprunaliga turkiskum ríkisborgarum)

Í Frakland: uml. 120.000

Í Danmark: uml. 30.000 (helst uml. 80% av sonevndum turkum).

Kurdar hava ongantíð verið savnaðir í einum kurdiskum ríki. Hetta hongur fyrst og fremst saman við, at teir av vinnumentan upprunaliga hava verið nomadar, og samfelagsskipanin hjá nomadum er miðspjødd (decentraliserað), t.v.s. uttan nakra samlaða yvirstjórn. Ikki fyrr enn í síðstu øld og serliga eftir fyrsta veraldarbardagа eru kurdar vorðnir búfastir í størri mun bæði sum bøndur í landsbygdum og sum arbeiðarar og tænastuvinnufólk í býum. At hetta hendi, komst fyrst og fremst av tí, at londini í Miðeystri blivu til í tí líki, vit kenna, og soleiðis komu fram landamørk, sum forðaðu kurdum at ferðast tær leiðir, teir vóru vanir at ferðast í øldir.

Hetta førdi so eisini tað við sær, at kurdar komu at búgva í fleiri ymsum londum – lond, sum høvdu nokk at gera við at finna ein samleika politiskt, og tí høvdu stjórnirnar í hesum londum onki forstáilsi fyri kurdanna tjóðskaparkenslu, tvørturímóti kendu tær hesa kenslu sum eina hóttan móti statsins existensi. Tí komu kurdar at vera og eru enn í andstøðu til sitandi stjórnir í hesum londum, meira í summum, minni í øðrum.

Í Turkalandi er tað bannað at siga, at mann er kurdi (tað gevur fongsilsrevsing), og líka upp til okkara dagar hevur eisini verið bannað at nýta kurdiskt mál alment í skrift og talu, undirvísingarmálið t.d. hevur altíð verið turkiskt (hetta er sera áhugavert, tá ið ein tonkir upp á, at munurin millum turkiskt og kurdiskt er nakað tann sami sum millum føroyskt og kineisiskt). Ein fylgja av hesum hevur sjálvandi verið tann, at kurdar hava verið nógv verri fyri, tá ið tað snýr seg um útbúgving, og tí eru teir tann fátækasti parturin av borgarunum í tí turkiska statinum. Tí kann ongin undrast yvir, at so nógvir teirra eru fluttir av landinum – bæði lógliga og ólógliga. Teir hava bæði tjóðskaparligar og búskaparligar grundir til tað.

Í Eysturturkalandi, har flestu kurdar búgva, er varandi undantaksstøða, og í Norðuriraq, har kurdar eisini búgva, eru harðir bardagar við stuttum millumbilum. Frá kurdiska umráðnum í Vesturiran hoyrist ikki so nógv beint nú, men eisini har hevur ofta leikað hart á, og samanlagt eru hundraðtúsundir av fólki deyð í stríðunum í hesum økinum, líka so ofta børn, kvinnur og oldingar sum vápnaførir menn.

Tá ið so kurdarnir afturat øllum øðrum eru vorðnir brikkur í altjóða politiska spælinum – Turkaland og Grikkaland, Iraq móti Vesturheiminum, Iran móti U.S.A., Ísrael og Arabaralond osfr. – sigur tað seg sjálvt, at teirra vón um politiska og tjóðskaparliga viðurkenning er ikki stór, og tað, at einaferð eitt Kurdistan fyri allar kurdar kemur at vera, er langt at síggja ímóti.

Slógv fyri milliardir

Fiskaslógv er við at gerast ein tydningarmikil inntøkukelda hjá norsku fiskivinnuni. Tað sum fyrr var burturkast er nú virðismikið í matframleiðslu til bæði menniskjur og djór



Úr Oslo: Jógvan Hugo Gardar

Seinastu seks árini hevur norska felagið Rubin fingist við at fáa meir burturúr slógvi. Hesi seks árini eru norðmenn farnir at brúka tvífalt so nógv slógv til sunnar og heilsurættar framleiðslur.

Í 1997 var umsetningurin av slógvi omanfyri 900 milliónir krónir. Í ár rokna tey við at fara uppum milliardina fyri eina vøru sum havhestarnir higartil hava fingið ókeypis. Hjá Rubin roknað tey við at um fá ár kunnu norðmenn selja slógv til víðariframleiðslu fyri minst tvær milliardir krónir.

Í 1997 var burturkastið hjá fiski- og alivinnuni meir enn 650.000 tons. Av hesum blivu meir enn 450.000 tons endurnýtt. Meginparturin endar sum fóður í alivinnuni. Útrokningar vísa at umleið ein fimtingur av fóðureftirspurninginum í Noregi kann nøktast við slógvi sum er malið til fóður. Hetta kann spara norsku alivinnuni fyri 150 milliónir krónur í fóðurútreiðslum.

Heilsukostur og heilivágur er tvey týdningarmikil økir har fiskaslógv kann brúkast í størri mun enn í dag.

Tiltøk

KFUM & KFUK

Hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK: Almennur bíbliufundur v/ Kjartan Mørkøre, sóknarpresti.

Konfirmantarnir í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi

byrja at ganga til í Vesturkirkjuni mikudagin 21. jan. kl. 15.

Konfirmatiónirnar verða 29. mars og 5. apríl.

Samkoman Immanuel

Í kvøld kl. 20.30: Møti.

Silvurbrúdleyp

Sunnudagin 15. februar kunnu hjúnini Maria og Kaj Eli Blábjørg, Fuglafjørður, halda silvurbrúdleyp.

Dagurin verður hildin í Leguhúsinum í Nesvík kl. 18.

Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 5. februar á tlf. 44302.

Prógv

Tummas Kastalag, Klaksvík, og Jónleif á Svínafløtti, Miðvági, hava lokið prógv sum maskiningeniørar á Københavns Teknikum.

Súsanna Kallsoy, Fuglafirði, hevur fingið sveinabræv sum hárfríðkari. Hon lærdi hjá Normu Egholm, Fuglafirði. Lærimeistari var Norma Egholm.

Durið Hansen, Argjum, hevur fingið sveinabræv sum grafikari við »Umbróting og Dataviðgerð« sum sergrein. Hon lærdi hjá Einars Prent í Havn. Lærimeistari var Eyðsvein Joensen.

Hanus Sjúrðaberg, Leirvík, hevur fingið sveinabræv sum bakari. Hann lærdi í Mylnuni, Tórshavn. Lærimeistari var Per Poulsen.

Uni Nón, Fuglafirði, hevur fingið sveinabræv sum maskinsmiður. Hann lærdi hjá KJ-Hydraulik í Fuglafirði. Lærimeistari var Kári Johannesen.

Eva K. Árting, Tórshavn, hevur fingið lærubræv í skrivstovuyrkinum yvirhøvur (all-round). Hon lærdi hjá Smyril Line í Tórshavn. Lærimeistari var Jóannes á Váli.

Katrin H. Joensen, Tórshavn, hevur fingið lærubræv í skrivstovuyrkinum yvirhøvur (all-round). Hon lærdi hjá Hjá Gunnleivi í Tórshavn. Lærimeistari var Brynhild Kamban.

Ari Snorrason Niclasen, Tórshavn, hevur fingið lærubræv í skrivstovuyrkinum – almen fyrisiting. Hann lærdi hjá Sorinskrivaranum. Lærimeistari var Andrup Johannesen.

Hans Christian Petersen, Miðvági, hevur fingið lærubræv í handilsvinnu – møblar. Hann lærdi hjá Føroya Møblasølu. Lærimeistari var Birgir Andreasen.

VALUTAKURSIR

		20.01.98	Ultimo síðsta mán.
USA	Dollarar	701,4500	673,4000
Bretland	Pund	1148,3600	1122,6000
Týskland	Markur	381,2500	381,4100
Svøríki	Króna	86,7500	87,6000
Noreg	Króna	92,5300	93,5900
Frakland	Frankur	113,9300	113,9900
Belgia	Frankur	18,4960	18,4970
Sveits	Frankur	467,5700	469,9700
Holland	Gyllin	338,3300	338,3900
Italia	Líri	0,3883	0,3893
Finnland	Markur	126,2800	126,5400
Ísland	Króna	9,7400	9,6600
Eysturríki	Skillingur	54,2340	54,2520
Spania	Pesetas	4,5080	4,5130
Portugal	Escudos	3,7350	3,7370
Kanada	Dollari	487,4300	476,8800
Grikkaland	Drakmur	2,4500	2,4490
Japan	Yen	5,4395	5,3125
Írland	Pund	960,1900	987,1100
	XEU	754,4700	753,4200

Kelda: Føroya Sparikassi

Sjómanskvinnuringurin í Havn

Sjómanskvinnuringurin kemur saman á Sjómansheiminum mikukvøldið 21. jan. kl. 20.00. *Allar* kvinnur eru vælkomnar.

Rhema á Hálsi

Í kvøld kl. 20: Vitnimøti.

Sunnudagin kl. 17: Møti og sunnudagsskúli. Fríðtór Debes talar.

Biðið verður fyri sjúkum. Øll eru vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórshavn

Í dag kl. 15: Bøn.

Hóskvøldið kl. 20: Heimaforbundið. Allar kvinnur kunnu vera við.

Frá Lívsins Orð

Møti verður í kvøld kl. 20.

Leygardagin kl. 17 verður barnamøti.

Sunnudagin kl. 17 verður møti.

Hvalvíkar Missiónshús

Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Stýrið

Meinigheitshúsið í Vági

Vikuskiftismøtir við Niels Jacob Nielsen og Regin Høgnesen verða frá hóskv. 22. jan. til sunnukv. 25. jan. Møtini eru kl. 20.00, tó sunnukvøldið kl. 18.00

Øll eru hjartaliga vælkomin.

Samkoman Sion, Vágur

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 73777.

Al Anon, Tórshavn

Fundir fyri avvarðandi av alkoholikarum eru hvørt týskvøld og hvørt hóskvøld kl. 21 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

AA-fundur

Sporafundur verður í kvøld kl. 20 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Felagið Tórshavn: GONGUTÚRUR

Sunnudagin 25. januar verður gongutúrur av Sundshálsi til Velbastaðháls. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 13. Havið góð og heit gonguklæði og kaffi við. Gingið verður umleið 3 tímar. Tilmelding.

Amnesty Interntional Føroya deild

Skrivstovan er opin:
Týsdag kl. 8.30–12.30
Hósdag kl 8.30–16.30

Deyvafelag Føroya

Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.00 til kl. 15.00.
Tlf. 1.7597, skrivitlf. 1.6929 fax 1.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo